# Ásgrímsson nýggjur aðalskrivari



Fyrrverandi íslendski forsætisráðharrin, Halldór Ásgrímsson, verður eftir nýggjár nýggjur aðalskrivari hjá Norðurlendska ráðharraráðnum (Rubrik).

Í gjár gjørdist greitt, at fyrrverandi íslendski forsætisráðharrin, Halldór Ásgrímsson, skal avloysa Per Unckel sum nýggjur aðalskrivari hjá Norðurlendska ráðharraráðnum. Seinastu vikurnar hava serliga tvey evni verið nevnd sum komandi aðalskrivari.

Umframt Halldór Ásgrímsson, varð finnlendingurin Jan-Erik Enestam mettur at hava góðan møguleika. Ísland hevur ongantíð áður havt aðalskrivaran, og hetta varð ein orsøk til at valið fall á Halldór Ásgrímsson.

– Málið er at gera norðurlendingar meira tilvitaðar um norðurlendska samstarvið í gerandisdegnum. Vit eiga í størri mun at kanna, hvat norðurlendingar halda norðurlendska samstarvið eigur at snúgva seg um, segði Halldór Ásgrímsson eftir útnevningina sum nýggjur aðalskrivari

**-páll**

# Íslendingar lata upp konsulat

**Fyri at fáa fulla úrtøku úr Hoyvíkssáttmálanum fer Ísland komandi ár at lata upp eitt General Konsulat í Føroyum, sum burturav skal røkja áhugamál hjá Íslandi í Føroyum. Løgmaður verður ikki bilsin um føroyskt vinnulív fer at krevja tað sama. Kortini fyriliggja ongar ítøkiligar ætlanir um eitt føroyskt General Konsulat í Ísland**

HOYVÍKSSÁTTMÁLI
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Keypmannahavn:** Seinnapartin í gjár var móttøka á Norðurbryggini í Keypmannahavn fyri at staðfesta, at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi. Fitt av fólki var savnað til móttøkuna á Bryggjuni seinnapartin. Umframt løgmann við fylgi, føroyska sendimaðurin í Keypmannahavn og íslendska uttanríkisráðharran, var bæði fyrrverandi og núverandi íslendski forsætisráðharrin til staðar og fleiri íslendskir politikarar, sum eru í Keypmannahavn í samband við Norðurlandaráðsfundin, løgdu eisini leiðina framvið Norðurbryggjuna.

## Konsulat

Undir móttøkuni kom undan kavi, at Ísland komandi ár fer at lata upp eitt nýtt General Konsulat í Føroyum.

Íslendski uttanríkisráðharrin Valgerður Sverrisdóttir segði, at nýggja General Konsulatið er eitt úrslit av, at Føroyar og Ísland við Hoyvíkssáttmálanum er blivin til eitt búskaparøki.

Konsulatið verður mannað av einum íslendskum diplomati, sum verður sendur úr Íslandi at røkja íslendsk áhugamál í Føroyum, so full nytta fæst úr Hoyvíkssáttmálanum, sum hon málbar seg.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, væntar, at føroyskt vinnulív fer krevja, at Føroyar seta eitt líknandi General Konsulat á stovn í Íslandi. Kortini fyriliggja ongar ítøkiligar ætlanir um eitt føroyskt General Konsulat í Ísland.

## Høvuðsmarknaður

Íslendski uttanríkisráðharrin vísti á, at hetta er á fyrsta sinni, at bæði Ísland og Føroyar gera ein so víðfevnandi samhandilssáttmála. Hon legði afturat, at hagtøl yvir samhandilin hjá Íslandi við onnur lond vísir, at Føroyar eru ein høvuðsmarknaður hjá íslendskum fyritøkum, og tí kemur nýggjur sáttmálin at fáa alstóran týdning fyri Ísland.

Valgerður Sverrisdóttir segði eisini, at í Íslandi var rættiliga stórur áhugi fyri nýggju avtaluni, sum íslendskar fyritøkur síggja stórar møguleikar í.

## Fyrsta stig

Jóannes Eidesgaard kallaði Hoyvíkssáttmálan fyri fyrsta stigi hjá føroyingum út í altjóðaøgerðina. Hann vísti á, at í Føroyum hevur verið ein ávísur ótti fyri sáttmálanum, tí vit bera ótta fyri, at íslendskar fyritøkur fara at skúgva føroyskar fyritøkur. Løgmaður helt fyri, at føroyingar eiga at skifta hugburð og síggja sáttmálan sum ein møguleika og eina avbjóðing heldur enn eina forðing, tí føroyskar fyritøkur hava ov leingi bert dúva upp á føroyska heimamarknaðin.



*Løgmaður og íslendski uttanríkisráðharrin, Valgerður Sverrisdóttir, síggja bæði stórar møguleikar í nýggja sáttmálanum.*

*Mynd: Símin J. Hansen*

## Eitt búskaparøki

Við Hoyvíkssáttmálanum eru Føroyar og Ísland vorðin eitt búskaparøki, og við ávísum undantøkum verður við sáttmálanum frælsur flutningur av føroyskum og íslendskum vørum, tænastum, kapitali og persónum millum londini.

Sáttmálin forðar eisini fyri, at mismunur verður gjørdur vegna tjóðskap, virkis- ella framleiðslustað.

# Marknaðurin vorðin seks ferðir størri

**– Hetta er fyrsta stigið móti altjóðaøgerðingini, sigur løgmaður um íslandssáttmálan. Hann heldur, at atfinningarnar eru púra burturvið, tí at javnvágin millum londini eru góð. Tó skal málið um landing av lodnu avgreiðast**

HOYVÍKSSÁTTMÁLIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

– Sáttmálin merkir, at Føroyar og Ísland verða eitt búskaparøki. Vit fáa ein felags innara marknað. Tey fýra frælsini, sum eru vøra, kapitalur, tænasta og arbeiðsmegi, hava frítt at fara millum londini, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Fyrimunirnir eru eins fyri bæði londini. Vit hava ikki loyvi at gera mismun á íslendingar orsakað av teirra tjóðskapi og hinvegin. Hetta er eitt stórt stig fyri Føroyar. Okkara heimamarknaður er sera lítil – kanska tann minsti í heiminum –, og hann er nú vorðin 6 ferðir størri, sigur hann.

## Umfatandi sáttmáli

Sambært Jóannes er hesin sáttmálin sera týðandi og sera umfatandi fyri Føroyar.

– Hetta er mest umfatandi sáttmálin hjá Føroyum nakrantíð. Íslendarar siga tað sama, og tað sigur alt um, hvussu umfatandi sáttmálin er, staðfestir Jóannes.

Møguleiki er fyri, at onnur lond gerast ein partur av sáttmálanum í framtíðini.

– Sáttmálin kann víðkast, um til dømis grønlendarar vilja gerast partur av honum. Hann kann eisini víðkast til at fevna um onnur øki, so sum mentan og umhvørvi, sigur Jóannes.

Jóannes óttast ikki, at sáttmálin verður brotin.

– Tað er ein felagsnevnd við føroyskum í íslendskum embætisfólkum, sum skulu hava eftirlit við, at sáttmálin verður hildin. Um tað vísa seg at vera tekniskar handilsligar forðingar, kunnu fólk boða nevndini frá. Nevndin kannar so umstøðurnar og hevur heimild til at stíga inn og rudda forðingarnar av vegnum, sigur hann.

Á heimasíðuni tinganes.fo stendur, at ávís undantøk eru. Jóannes greiðir nærri frá hesum:

– Tað eru ávís undantøk báðar vegir. Føroyingar hava fiskivinnuna sum undantak, ímeðan íslendarar hava virkini sum undantak. Eisini hava vit eitt fyrivarni yvirfyri einari møguligari oljuvinnu.

## Atfinningar burturvið

Tað hava verið nógvar atfinningar móti Hoyvíkssáttmálanum í seinastuni. Fólk í vinnuni hava víst á, at javnvágin í sáttmálanum ikki er nóg góð, og at íslendarar fáa fleiri fyrimunir enn føroyingar. Politikarar hava eisini tikið undir við atfinningunum. Jóannes Eidesgaard skilir tó ikki hesar atfinningar:

– Tað er púrasta burturvið. Sáttmálin er púra í javnvág. Eg skilji tó væl, at fólk eru upptikin av hesum, tí at stórar fyritøkur koma inn á okkara marknað. Men vit mugu tora at bjóða øðrum av uttan fyri landoddarnar. Vit kunnu ikki bara verða liggjandi í okkara egna dunnuhyli. Um vit ynskja at menna okkum, mugu vit taka við nýggjum avbjóðingum til tess at betra okkara kappingarføri. Eg trúgvi at atfinningarnar koma orsakað av einum nervøsiteti, sum fer at fortaka seg. Hetta er fyrsta stig móti altjóðaøgerðingini, sigur Jóannes.

## Lodnan skal fáast uppá pláss

Nógv hava funnist at forðingunum innan fiskivinnuna. Føroyingar hava ikki loyvi at landa lodnu, sum er fiskað undir Íslandi, í Føroyum. Jóannes er tó vónaríkur um, at hetta fer at broytast heilt skjótt. Hann heldur ikki, at tað er grund til at óttast hetta.

– Vit hava gjørt eina avtalu um eina felagslýsing. Har stendur, at vit skulu arbeiða fyri at taka forðingar fyri at landa fisk burtur. Tí er einki at óttast. Politikkur snýr seg um álit, og eg havi álit á, at hetta fer at loysa seg í nærmastu framtíð. Tú kanst siga, at hetta er vágið, men tað meti eg ikki, sigur Jóannes.

– Málið er í politisku smiðjuni beint nú. Bjørn Kallsø arbeiðir við hesum, og eg havi eisini samráðingar við uttanríkismálaráðharran í Íslandi. Vit skulu møtast í januar, og tá vóni er, at hetta verður avgreitt, sigur hann.

Um íslendingar drála við at loysa hetta, skal Løgtingið taka støðu til, hvat næsta stigið verður.

– Um fortreytirnar broytast, verður hetta tikið upp í tinginum. Men vit væntа ikki, at nakrir trupulleikar verða, sigur Jóannes Eidesgaard at enda. Les viðmerkingar frá Høgna Hoydal í blaðnum í morgin.